# TILTØK

**Gudstænastur**
**1. sunnudag e. trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11 Erland Beder
*Nólsoy:* kl. 12, altarg., skriftamál kl. 11.40, Sonja Klein
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Kollafjørður:* kl. 11, Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11 familjugudstænasta, Sverri Steinhólm og Snorri Brend, trúboðari
*Skála:* kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Nes:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Gjógv:* kl. 12 messa,
*Eiði:* kl. 18 barnagudstænasta, Emil Olsen
*Norðskála:* kl. 11, Kjartan Mørkøre
*Viðareiði:* kl. 11, altarg., Elsa Funding
*Sumba:* kl. 12, altarg., Ólavur Rasmussen
*Skálavík:* kl. 12, Uni Næs
*Skúvoy:* kl. 12, altarg., J. R. Hansen
*Leiti:* kl. 12, altarg., Bjarni Bæk
*Leirvíkar kirkja:* Talvan gongur fyri Bíbliufelagið

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður minnismáltíð Harrans. Samstundis verður barnaansing, kl. 12 verður Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini Møti har Virgar Hvidbro talar.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Ósjálvsøkin tænasta, kl. 11 Gudstænasta. Adventkirkjan verður 25 ár. Aftan á gudstænastuna verður felags døgurði.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardag kl. 11 Útifundur í miðbýnum um viðrar.
Sunnudag kl. 11 Halgunarfundur. Bøn kl. 17.30. Evangel. fundur kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld After Eight, høllin er opin frá kl. 13-15.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jóhan P. Johannesen, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ pater Quand Minh Nguyen í Mariukirkjuni.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Møti og Sunnudagsskúli, Mervin Gunaselvan av Sri Lanka talar. Eisini verður barnavælsignilsi. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Í Hoyvíkar skúla:
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Júst Ramussen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 19.30 úti á Fløtum Bøn og bíbiltími.
Heimasíðan www.livdin.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti v/ trúboðarafamiljuni Brend í Mali. Innsavnan til ytrimissión.

**Ebenezer**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Heimasíðan www.ebenezer.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Summarkonsertir í Havnar kirkju**
Leygardagin 21. juni kl. 11.30 verður matiné í sambandi við Summartónar. Tað verður ein violin-duo úr Svøríki, ið fer at spæla. Á Summartónum er altíð nýskapaður føroyskur tónleikur á skránni, ofta frumframførslur. Soleiðis verður eisini hesaferð.

**Nólsoy**
Leygarkvøldið 21. juni 2003 verður hugnakvøld í Nólsoy við mykjukapping kl. 19, sólstøðubáli og grillgildi kl. 20 og harmonikudansi kl. 23-04. Ritan og Norðlýsið sigla eykatúrar í samband við tiltakið.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Jógvan Johannesen. Mánadagin kl. 20 Evangel. møti við Øystein Rong úr Noregi. Øll eru hjartaliga vælkomin. Telefonandaktin 424741.

**Vikuskiftismøtir í Vakhús í Sandavági**
Leygardagin kl. 16 Útimøti í Sandavági um viðrar, kl. 20 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 15.30 Evangel. møti. Herman og Gigga syngja.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Agnar Nielsen, Vestmanna. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Dávid Bech.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Á skránni er »surprise-kvøld«.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti.

**Soli Deo Gloria**
Leygarkvøldið kl. 21 Café kvøld. Team úr Kolding luttekur.
Sunnudagin kl. 18 Møti, Peter Prothero talar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**KFUM og K í Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 22 »Opið hús«.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Øssur Kjølbro, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 hevur Sunnudagsskúlin avslutning og kl. 18 er Møti við Poul Nicolai. Barnaansing er undir møtinum. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Leivi Leivsyni. Einki kvøldmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna summarfrí. Kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta. Kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.




## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 21.6. Eiði, tlf. 42 30 06
Sunnudagin 22.6. Skála, tlf. 44 14 90

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Johan og monsu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur (um viðrar). Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 21 Bønarmøti. Frá kl. 21 til 23 verður Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður í kvøld kl. 20 í húsinum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, ella um viðrar útferð, kl. 18 evangel. møti.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 23. juni*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Kortspæl, telving, landastrok, telving, dart og onnur spøl.
**Ólavsøkulistin er komin.**
*Týsdagin 24. juni:*
kl. 10-12 Vit baka til ólavsøku
kl. 10-11.30 Felagssangur við starvsfólkum á býráðunum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
*Mikudagin 25. juni:*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 26. juni:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen. Hugnaløta.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 27. juni:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – Náttartúrur**
Leygarkvøldið 21. juni verður náttartúrur til Suðuroyar. Farið verður av Havnini kl. 20 við Smyrli. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 23. juni
Upplestur
Mikudagin 25. juni
Spurnarkapping og sangur.
Vit fara í summarfrí frá 1. juli til 1. september.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

## SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 30. juni kunnu hjúnini Elsebeth og Birgir Andreasen, Tórshavn halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. juni við morgunmati. Opið hús frá kl. 08.00 til kl. 11.00 á Falkavegi 2 (Idé Møblar).

## 85 ÁR

25. juni fyllir Lina Arge, Tórshavn, 85 ár. Er at hitta á Hotel Hafnia kl. 15.00-18.00.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 28. juni kl. 15.00 giftast í Fløng kirkju Tórun Poulsen, Skipanes og Thomas Juul Andersen, Hedehusene. Veitslan verður fyri innbodnum á Stationsvej 18, 2640 Hedehusene.

Leygardagin 5. juli giftast Anna Maria Sjóstein og Heðin á Lakjuni, bæði úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður á Hotel Norð á Viðareiði kl. 17.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, kunnu ringja á tlf. 262368, 225701, 456068 ella 456021 innan 27. juni.

Leygardagin 12. juli kl. 11.00 giftast í Vágs kirkju Anna Borg Dahl og John Eystberg. Brúdleypið verður hildið í VB-húsinum kl. 13.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 5. juli á tlf. 373017, 373015 ella 0045 32886808.

Leygardagin 12. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Anna-Maria Hansen, Skopun og Herluf Gudmundarson, Tórshavn. Veitsla verður fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 19.00.

Leygardagin 12. juli kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Helena Hansen, Toftir og Janus Trúgvason, Strendur. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 447522, 448113 ella 314948 (aftaná kl. 18) í seinasta lagi 28. juni.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Jutta Augustinussen, Vágur og Sigmund Olsen, Hvalba. Veitslan verður í Roynhøllini í Hvalba kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 373073 ella 375222 ella 0045 76253517 í seinasta lagi tann 1. juli.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Klaksvík Vígdis Kristiansdóttir og Jógvan Skorheim, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður kl. 19.00 á Hotel Norð á Viðareiði. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, biðjast vinarligast siga frá á tlf. 455931, 224921, 455553 ella 221849 í seinasta lagi 1. juli.

Leygardagin 26. juli kl. 15.00 giftast í Hvalbiar kirkju Poula Næs, Hvalba og Rúni Thomsen, Froðba, búsitandi á Eiði. Vælkomst verður í Roynhøllini kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma til veitsluna, verða biðin um at siga frá á tlf. 423393 ella 221133 innan 7. juli 2003.

Leygardagin 2. august kl. 16.00 giftast í Elim í Søldarfirði Evi Hallursdóttir Jacobsen úr Skálabotni og Faber Isaksen úr Søldarfirði. Veitslan verður í kappróðrarneystinum á Glyvrum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá á tlf. 506913, 504543, 441043 ella 441687 í seinasta lagi 12. juli.

Leygardagin 9. august kl. 13.00 giftast Sunva Eysturoy og Poul Jens Lassen í Kúrdali (Gl. Hoyvíkin). Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 17.30. Vælkomst verður kl. 21.30. Hava tit hug at halda kvøldið saman við okkum eru tit hjartaliga vælkomin! Sigið bert okkum frá á tlf. 313860 ella 456465 innan 9. juli. Um ikki viðrar verður vígslan í Ebenezer.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Meistari, vit vilja fegnir síggja eitt tekin frá tær!*
***Matt. 12,38***

Farisearanir krevja tekin fyri at góðtaka Jesus sum frelsara og harra. Og at krevja tekin er tað sama sum at vilja sleppa undan at trúgva. Tað er tað sama sum at krevja prógv uppá sannleikan, hvør Jesus í grundini er. Nútíðin krevur prógv og vitan. Og alt gott at siga um tað. Men tá vit standa frammi fyri Jesusi, verða ikki prógv og tekin givin. Her velst um trúgv ella vantrúgv. Vit fáa sum kristin ikki loyvi til at stuðla og styðja trúnna við teknum. Boðskapurin hevur í sjálvum sær skapandi megi. Hann sannførir til trúgv. Hví so ikki øll trúgva, er eisini ein gáta. Men tað hevur nokk við útveljingina at gera. Tá vit hoyra gleðiboðskapin prædikaðan siga vit ja í trúgv, ella siga vit nei í vantrúgv. Orðið um krossin røkkur ikki fram til øll. Summi krevja tekin. Men trúgv er ikki vitan. Trúgv er at tora at taka Jesus uppá orðið, tá boðskapurin ljóðar. Vantrúgv er at siga nei til Jesus sum skapara og frelsara. Kristna trúarjáttan okkara sigur, at Jesus er bæði Gud og menniskja. Hann er stigin niður av himni at frelsa og sannføra til trúgv. Í kirkjum okkara hoyra vit um Jesus, Gud og menniskja. Hvat kemur burtur úr prædiku okkara, ráða vit ikki fyri. Tað er bara Gud, sum gevur vøkstur. Vit fáa ikki tekin; men vit fingu Jesus, krossfestan og upprisnan fyri hvønn tann, sum trýr. Nú síggja vit í gátu. Vit liva ikki í skoðan; men í trúgv. So er spurningurin, um vit eru nøgd við trúgv uttan tekin ella ikki. Tað er ein ónd slekt, sum leitar um tekin, sigur Jesus.

Amen.

**David Johannesen**




**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 21.06. kl. $19^{00}$
Leygardagin 21.06. kl. $21^{15}$
Leygardagin 21.06. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 22.06. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 22.06. kl. $22^{15}$




Leygardagin 21.06. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 22.06. kl. $19^{30}$




Leygardagin 21.06. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 22.06. kl. $22^{00}$

**KOMANDI FILMAR**




**Heimsfrumsýning**
Hósdagin 26.06. kl. $20^{15}$




**Undanfrumsýning**
Hósdagin 26.06. kl. $22^{30}$
**Prísur 120,- kr.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**